gult cyan magenta svart

Frændur vi› á ólavsøkukonsertini

Teir tríggir Steintór, Ey›un og Rani ver›a at hoyra á ólavsøkukonsertini

Nú er greitt hvørjir teir átta bólkarnir eru, sum fara at luttaka á árligu Ólavsøkukonsertini, sum ver›ur hildin í Kommunuskúlagar›inum hóskvøldi› 27. juli

FRÓ›I LØKSÁGAR›

Eitt av vælvitja›u tiltøkunum á hvørjari Ólavsøku, er Ólavsøkukonsertin, sum nú hevur veri› ein afturvendandi táttur í mong ár. Henda konsert hevur bjó›a› uppá nógvar spennandi tónlistarligar upplivingar. Ver›ur hugt eftir skránni fyri komandi Ólavsøkukonsertina, so er mangt sum bendir á at hetta eisini ver›ur galdandi í ár.

Átta bólkar fara at spæla á konsertini í Kommunuskúlagar›inum tann 27. juli. Konsertin byrjar klokkan n‡ggju, og hildi› ver›ur á til klokkan tr‡ um náttina. Luttakandi bólkarinir eru:

Frændur
Ikki n‡tist at siga so nógv um henda bólkin, anna› enn at hann er ein av best umtóktu føroysku bólkunum nakrantí›. Bólkurin hevur lati› fimm útgávur úr hondum, um savnsfløgan Svart Gull ver›ur tikin vi›. Seinast bólkurin lat frætta frá sær, var› tá hann saman vi› Føroya Symfoniorkestri fylti Nor›urlandahúsi› tvær fer›ir.

All That Rain
Hetta er á ein hátt ein n‡ggjur bólkur, men tó ikki. Limirnir í All That Rain hava allir eina fortí› í Kjølum. Bólkurin hevur ikki spælt saman so leingi enn, men hevur sta›i› seg sera væl til tey tiløk har teir higartil hava luttiki›. All That Rain spæla heimagjørdan tónleik, sum fyri ta› mesta er rokktónleikur.

Tangz
Hesin bólkurin kom av álvara fram til seinastu Prix Føroyar har teir rættuliga gjørdu vart vi› seg. Sí›ani kappingina hevur bólkurin givi› út eina stakfløgu vi› eitt nú lagnum Undir somu d‡nu, sum hevur veri› nógv at hoyra. Tangz hava ikki gjørt so nógv um seg í seinastuni, og ver›ur ta› tí spennandi at vita hvat teir hava at bjó›a uppá.

I Am
Hetta er nokk tann kendasti føroyski gospelbólkurin í løtuni. I am, sum eru úr Klaksvík, hava nøkur ár á baki. Í fjør gav bólkurin út fløguna Cast, sum hevur veri› rættuliga nógv spæld her heima. I Am eru fyri stuttum komnir heim aftur av fer› í Íslandi, har teir spældu til eina stóra nor›urlendska ungdóms og mentunarstevnu, sum var› hildin í Reykjavík

Airbags
Tey flestu kenna nokk best til hetta navni› í samband vi› bilar. Airbag er tó eisinis ein tónleikabólkur, manna›ur vi› ungum monnum. Bólkurin luttók á Pop Top konsertini sum var› hildin í Grasagar›i fyrr í ár. Har var› bólkurin útnevndur til besta bólk. Hesin hei›ur gevur atgongd til Ólavsøkukonsertina.

Clickhaze
Ungu eysturoyingarnir úr Clickhaze hava ikki spælt saman seinastu tí›ina, men eru nú komin saman aftur til Ólavsøkukonsertina. Vi› Petur P. Jensen og Eivør Pálsdóttur á odda, fekk bólkurin sítt gjøgnumbrot til seinastu Prix Føroyar kapping. Sí›ani hetta hava limirnir í bólkinum mest veri› settir í samband vi› onnur nøvn. Eitt nú hevur Eivør Pálsdóttur veri› nógv at hoyrt saman vi› bólkinum Ivory, og Petur P Jensen er eisini limur í Visible Fish.

Wild Child
Eins og Tangz, so hava Wild Child eisini givi› út eina stakfløgu sí›ani luttøkuna í Prix Føroyar kappingini. Bólkurin er úr Su›uroy, og hevur gjørt um seg vi› rokktónleiki vi› kraftigum íblástri frá 80'ára rokki. Heldur ikki Wild Child hava veri› nógv frammi í seinastuni so stuttligt ver›ur at vita hvat Poul Arni Holm og hinir úr Wild Child fara at borrei›a vi›.

Flux
Ungu mennirnir í Flux eru kendir fyri at spæla rokktónleik í tí tyngra endanum. Eftir Prix Føroyar kappingina har bólkurin luttók, høvdu teir hitt vi› lagnum Mr. Headless. Eisini n‡ttu teir høvi› at spæla nógv alment. Flux er avgjørt ein av teimum mest spennandi ungu rokkbólkunum í Føroyum í dag.

Ta› er Føroya Undirhaldstónleikara Felag, ella bara stytt F.U.T. sum skipar fyri konsertini í Kommunuskúlagar›inum á Ólavsøku.

Fólkatónleikur í Grasagar›i í Havn

Karl Seglem spældi á ve›rahorn

Leygardagin var útikonsert í Grasagar›i í høvu›sta›num. Tiltaki› var í sambandi vi› fólkatónleikarastevnuna. Vi› vóru Gigl, Shalder Geo, Utla (Noreg) og Anders Hagberg (Svøríki). Naka› av fólki var komin saman at lurta og hetta bleiv til eina heilt hugnaliga løtu

Utla, sum er ein norskur bólkur, hevur fer›ast nógv vi› sínum tónleiki; um alt

Evropa, USA, Canada og í Japan. Tónleikurin er ein blandingur av si›bundnum norskum og meiri n‡brotnum tónum, vi› føstum kompositiónum og improvisatión.

Tónleikurin hjá Utla hvílir mest á fiólspælinum; Håkon Høgemo spælir fiól. Karl Seglem á saxofon og Norskt ve›rahorn. Terje Isungset trummur, ásláttur og jødaharpu. Utla hevur givi› 4 fløgur út og er tónleikurin bólka›ur undir fólka-jazz.

Anders Hagberg spældi saman vi› fe›gunum Mikal og Kristian Blak. Ta› hoyrdist at hetta var ein royndur tónleikari. Tvørfloytu og sopransaxofon eru hansara instrumentir. Anders Hagberg er eisini kendur frá bólkinum Mynta, sum er manna›ur vi› indiskum og svenskum tónleikarum; ein spennandi samanseting.

Onkur av løgunum, sum Anders spældi, høvdu asiatiskan íblástur.

Fólkatónleikarastevnan endar á hesum sinni mánadagin 17. juli, í Klæmintsgjógv undir Hestoynni. Nor›l‡si› ger eina av sínum mongum fer›um út til Klæmintsgjógv. Har fer Anders Hagberg at spæla.

gult cyan magenta svart

Løgtingi› fær meira pláss

Tinghúsi› skal nú byggjast um, solei›is at tingsalurin fyllir alla ni›aru hæddina. Harafturat skal løgtingsskrivstovan flyta í telefonbygningin

JOHN JOHANNESSEN

Í heyst ver›ur fari› undir fyrsta stig av einari n‡ggjari ætlan um at byggja um løgtingshúsi›.

Hetta fyrsta stigi› av ætlanini fevnir um at skifta klædning, vindeygu og tak á løgtingshúsinum og at taka ni›ur torni› á bygninginum, har Føroya Tele heldur til, og gera ovaru hæddina í tí bygninginum klára til løgtingsskrivstovuna at flyta inn í.

Fyrsta stigi› li›ugt í ár

Løgtingsarbei›i› ver›ur lagt ni›ur einafer› í heyst, me›an handverkarar umvæla løgtingshúsi›. Ætlanin er nevniliga, at fyrsta stigi› skal vera li›ugt longu í ár.

Á fíggjarlógini fyri í ár eru átta milliónir játta›ar til løgtingshúsi›. Og ta› fer at bera til at umvæla løgtingshúsi› fyri hesa játtan, vissar Finnbogi Ísakson, løgtingsforma›ur um.

Tá løgtingshúsi› er li›ugt umvælt uttan, er meiningin, at ta› skal líkjast løgtingshúsinum, sum ta› sá út í 1907, tá ta› var› bygt um.

Løgtingshúsi› fær slættan klædning og ver›ur mála› hvítt. Vindeyguni fáa fleiri smærri rútar og flagtekjan ver›ur skift út vi› skifertekju.



Venda tingsalinum

Næsta byggistig fevnir um at broyta tinghúsi› innan, umframt at ein glasbygningur skal gerast millum telefonhúsi› og tinghúsi›. Hesin glasbygningurin skal ikki vera fastur í tinghúsinum. Hann skal standa har, torni› á telefonhúsinum nú stendur.

Innan skal tinghúsi› broytast, solei›is at tingsalurin fyllir alla ni›astu hæddina. Eisini skal tingsalurin vendast, solei›is at rø›arapallurin og sessurin hjá tingformanninum eru í sy›ra endanum, oman móti tinghúsvøllinum. Hetta fer at gera tingsalin munandi rúmligari, enn hann nú er.

Ein partur av kjallaranum í tingúsinum skal spreingjast út, og har skulu ves og garderoba gerast.

Á loftininum í tinghúsinum skulu gerast smáar skrivstovur og kopirúm. Hetta merkir, at verandi uppihaldsstovan hjá tinglimum á tinghúsloftinum ver›ur tikin burtur. Tingmenn fáa í sta›in n‡ggjar uppihaldsstovur í telefonhúsinum.

Tinghúsini hava fingi› n‡ggjan klædning og n‡tt tak. Telefonverksbygningurin er umbygdur. Torni› er tiki› ni›ur og millumbygningur bygdur í sta›in. Gar›urin kring tinghúsi› er eisini tikin ni›ur

Gera tunnil ímillum

Glasbygningurin millum telefonhúsi› og sjálvt tinghúsi› skal ikki vera fastur í tinghúsinum. Men kortini skal samband vera ímillum bá›ar bygningarnar. Tí ver›ur nú umhugsa›, um ein lítillátin glasgongd skal gerast ímillum, ella um ein tunnil skal gerast undir túninum. Men sum skilst, ver›ur talan helst um at gera ein tunnil.

Hetta arbei›i› ver›ur ikki gjørt fyrr enn einafer› næsta ár, tá Føroya Tele so smátt er fari› at flyta úr telefonhúsinum. Tá Føroya Tele um nøkur ár hevur flutt alla teknisku útger›ina úr húsinum, er ætlanin, at løgtingi› skal brúka alt telefonhúsi›.

Løgtingsskrivstovan flytir úr leiga›u hølunum í Erling Jalsgøtu ni›an í telefonhúsi›, so skjótt pláss er fyri henni í telefonhúsinum.

Arkitektarnir aftan fyri verkætlanina eru teir somu, sum fyri gó›um ári sí›ani vunnu arkitektakappingina um n‡tt løgtingshús.

Hevur ikki veri› í Føroyum sí›ani 1943

Jack Crow og konan Iris vitja›u í farnu viku í Føroyum. Hann var herma›ur í Vágum í 1942 og naka› av 43, men hevur ikki vitja› aftur sí›ani, fyrr enn hann fyri kortum kom í samband vi› føroyingar á fer› í Onglandi. Tá Jack var í Vágunum, var einki ravmagn og heldur ikki bilar

DAGFINN OLSEN

Fyri ikki so langari tí› sí›ani, vóru føroyingar á sangfer› í Onglandi. Tá Jack Crow hoyrdi, at føroyingar vóru har, gjørdi hann saman vi› konuni av at fara og seta seg í samband vi› teir. Jack er upprunaliga úr London, men b‡r nú í Cambridge.

Jack var herma›ur í Føroyum undir seinna heimsbardaga. Hann var vesturi í Vágum. Hann kom í 1942 og var í gó›ar 17 mána›ir. Sum vanligt var tá, so komu ensku hermenninir at búgva inni hjá fólki fyrstu tí›ina, har rúm vór›u leiga› til teirra. Jack kom at búgva hjá Theodor og Elisabeth Dam í Sandavági. So væl dámdi honum hjá teimum, at hann var har alla tí› sína í Føroyum, hóast hinir fluttu a›rasta›ir at búgva, so hvørt sum hermenninir funnu seg til sættis.

Jack setti seg í samband vi› Alexander Samuelsen, sum var vi› á fer›ini í Onglandi.

– Vit sungu í Onglandi fyri einum ári sí›ani og vór›u bo›in aftur í ár. Vit sungu í ár í Withby í Nor›ur Onglandi. Jack hev›i sæ› eitt uppslag um hettaá einum campingplássi, ella okkurt tílíkt, og gjørdi av at koma. Vit gjørdust vinir, har hann kom vi› føroysku húgvuni, sum hann hev›i fingi›, tá hann var í Føroyum, sigur Alexander Samuelsen, sum bey› Jack til Føroya.

Jack spurdi Alexander, um hann kendi hesi fólkini í Sandavági, sum hann hev›i bú› hjá. Ta› gjørdi hesin ikki, men lova›i tó at kanna máli›.

Alexander, sum vit kenna frá Víngar›inum í ÚF, har hann eisini hevur havt prát vi› Jack, fann útav, at vertirnir hjá Jack undir seinna heimsbardaga liva ikki longur. Alexander bey› Jack at vitja í Føroym og hann setti seg í samband vi› eftirkomararnar hjá Theodor og Elisabeth Dam.

Hóast hetta var heldur sorgblítt hjá Jack at frætta, at fólkini hann bú›i hjá ikki longur eru á lívi, so kom í lag, at Jack kom at vitja børn og barnabørn hjá Theodor og Elisabeth Dam. Og áhugavert og kenslubori› hevur veri› hjá bá›um pørtum, tí eisini børn og barnabørn hava hoyrt frásagt um enska hermannin. Fyrstu dagarnar á fer›ini vóru Jack og Iris í Havn, men sí›ani var› fari› vestur í Vágarnar.

Jack og Iris Crow avmynda› í Sørvági Mynd: Dagfinn Olsen

Jack og Iris Crow hava veri› sera fegin um at hitta eftirkomararnar og at vitja her, i› Jack var sum herma›ur. Jack sjálvur hevur tó ikki lagt størsta dentin á at vitja stø›ini og hesi hava ikki havt hansara størsta áhuga. Heldur er hann komin aftur fyri at vitja fólki› og eftirkomarar hjá teimum, i› vístu honum stórt gestablídni.

Jack var eisini sendur a›rasta›ni sum herma›ur undir seinna heimsbardaga, men ta› eru bert Føroyar, i› hann ikki hevur vitja› aftur. Men nú hevur hann so veri›. Og nógv er eisini broytt, sí›ani hann var í Føroyum fyri eini 57 árum sí›ani. Hann var tá 26 ára gamal. Tá var einki ravmagn og bilar vóru eingir í Vágum, uttan onkur lastbilur hjá ensku hermonnunum. So ei undir í, at Jack hevur ilt vi› at kenna seg aftur, hóast fjøll og fir›ir eru tey somu. Og sum hann sigur, so er t.d. Sørvágs bygd hin sama, bert nógv størri.

Jack og Iris Crow fóru avsta› aftur úr Føroyum mánadagin 10 juli.